# TILTØK

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Michael Bienkowski, presti í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um 8. kap. í Opinberingini.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagssskúli og kl. 12 verður eisini møti. Richard Schwartsson talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin kl. 19 verður tiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hósdagin kl. 20 Bíbliutími v/ Tom Skaale. Evnið: Op. 22.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Tummas Jacobsen, evnið er »U-vending«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, missiónsmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Sam Jakobsen, evnið er: »Eitt praktiskt kristinlív í familjuni« 2. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin og breakthrough worship.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, har verður serstøk sangløta. Á tilbiðjanarmøtinum talar Jóhan Syderbø um »Hugleiðingar um Jesu føðing. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Øll eru vælkomin.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 19 skipar Herbergið fyri veitslu fyri innbodnum.
Hósdagin kl. 19 hevur heimaforbundið Jólahugna fyri øllum kvinnum.

**Frá Ebenezer**
Mikudagin kl. 16.45 Sangvenjing – yngra barnakórið, kl. 17.30 AWANA fyri børn í 1.-4. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 10 Fyrrapartsløta fyri eldri menn í Sloans húsi, kl. 17 Sangvenjing – eldra barnakórið, kl. 20 Ungdómsmøti og hugnaløta. Seinasta ungdómsmøti fyri jól. Talari: Jóan Magnus Rasmussen.
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 Ungdómsmøti, Jólaevangeliið.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Jóla- og barnagudstænasta í Havnar kirkju, Gentukórið luttekur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Haldórsvík**
Í kvøld verður bíbliuundirvísing og bønarmøti kl. 20 hjá Elianu og Magnus Olsen. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Dávid í Lág.
Sunnudagin kl. 17 Barna- og familjujólafest (nátturði aftaná – øll taka við). Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Aglow, Eysturoy**
Jólamøti verður hósdagin 9. des. kl. 20 í Hæddini í Runavík við Bodil og Malmberg. Bæði kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Páll á Lakjuni talar. Evnið: Tey sjey »liva« í Efesusbrævinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nebo, Toftir**
Símun Ósá og Óli Steinberg vera við á møtinum mikukvøldið kl. 20.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími, Áps. kap. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Vælkomin til jólahugna mikudagin 8. desember kl. 18. Góður matur er at fáa, ymiskt til gaman og álvara. Tilmelding og kostnaður á tlf. 361204 og 269998.

**Betania í Porkeri**
Møtir við Jógvan Zachariassen vera í Betania í Porkeri ónskvøldið, tórskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20. Evnið verður: Andaligur búnaskapur.

**Evangel. fundur í DK**
Fríggjakvøldið 10. des. kl. 19.30 Evangel. fundur í Sædding Cnter, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 12. des. kl. 17 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Á øllum hesum fundum syngur yngra Kvartettin úr Betesda, Klaksvík. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar borðreiða vit við kaffi og føroyskum viðskera. Børnini fáa pakka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 6. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
**10. des. verður jólaborð í Tilhaldinum. Tilmeld. tlf. 316491.**
*Týsdagin 7. november*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Hugleiðingar úr farnu tíðum. Elin Mortensen
*Mikudagin 8. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jóladøgurði
kl. 13.00-17.00 Opið hús
*Hósdagin 9. desember*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 15.00–17.00: **Jólasøla og tombola í kjallaranum**
*Fríggjadagin 10. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jólaborð
kl. 14.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 8. des.:*
Vit fara til Skálavíkar til jólahugna. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 18.00 og vit fara úr aftur Skálavík kl. 22.30. Kostnaður 100,- fyri høvnn.
**Mánadagin 13. des. fara vit til Havnar ein jólahugna túr. Neyðugt er at melda seg til túrin í Tilhaldinum ella á tlf. 361990 áðrenn fríggjadagin 10. des. á middegi.**

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 6. november*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Aftaná gera vit jóladekoratiónir
*Týsdagin 7. november:*
Vit spæla Boccia v/ Elnu Skylv Hansen, sum eisini greiðir frá um spælið Boccia
*Mikudagin 8. desember:*
Ítriv við ull
*Hósdagin 9. desember:*
Dagtilhaldið stongt

*Fríggjadagin 10. desember:*
OPIÐ HÚS. Kaffi, te og holukøkur.
**Nýggjárshugnaløta verður 6. januar 2005. Vinarliga sigið frá luttøku áðrenn 15. desember. Til ber at hava gest við.**

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis.
Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480.
E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.






**Skrivstovubygningar til sølu**

Ognirnar Yviri við Strond 17 og 19 verða hervið lýstar til sølu. Talan er um tvey matrikkulnummur, sum verða seld saman ella einsæris.
Bygningarnir liggja sera væl fyri; stutt úr miðbýnum, við góðum útsýni og miðskeiðis millum fleiri av fremstu fyritøkum í landinum.

Ognirnar eru Yviri við Strond 17, matr. Nr. 620x, sum liggur næst miðbýnum og Yviri við Strond 19, matr. Nr. 620z. Tilsamans er grundøkið 1691 fermetrar.

Skrivstovubygningarnir eru samanbundnir við eini millumgongd uppá 21 fermetrar á fyrstu hædd. Báðir bygningarnir eru í trimum hæddum og harumframt hevur bygningurin Yviri við Strond 17 eitt loftsrúm uppá 120 fermetrar. Bygningarnir verða seldir við umhvørvisgóðkenning.

Økið rundan um bygningarnar er fríðkað við runnum og blómuteigum og annars gjørt til parkeringsøki og inngongd. Harumframt eru góð parkeringsviðurskifti í økinum.

Sum er, fyriliggur ein skitsu-verkætlan fyri økið um m.a. gerð av íbúðum við altanum og havútsýni.

Meira kunning fæst við at venda sær til:

Pf. Meinhardt Arge
Att.: Finnbogi Arge
við Oyggjarvegin
100 Tórshavn
tlf. 355 400

| | Yviri við Strond 17 | Yviri við Strond 19 |
|---|---|---|
| Matrikkulnummar | 620x | 620z |
| Stødd á grundøki | 858$m^2$ | 733$m^2$ |
| Grundvídd á bygningi | 288$m^2$ | 150$m^2$ |
| Byggiár | 1972 | 1986 |
| Gólvvídd | 864$m^2$ | 447$m^2$ |
| Loftsrúm | 120$m^2$ | - |
| Gólvvídd tils. | 964$m^2$ | 447$m^2$ |
| Skrivstovur/fundarhøli | 18 | 14 |
| Móttøkuhøli | 1 | 1 |
| Kopirúm og edv-rúm | 3 | 2 |
| Goymslurúm | 1 | 4 |
| Toilet | 6 | 6 |
| Køkur og matstova | 1 | - |

P/F Meinhardt Arge
við Oyggjarvegin www.bilarge.fo